# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nú er Malla farin



Náttina til mikudagin 15. september andaðist Malla Jacobsen í Svínoy. Hon var 102 ára gomul, nú hon andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Malla var síðsta árið og reiðiliga tað í sambýlinum fyri eldri í Klaksvík. Hagani varð hon í síðstu viku innløgd á sjúkrahúsið, og nú fjarðaði hon burtur, mett av døgum.

Malla varð fødd 23. juli í 1902. Hundrað ára føðingardagurin hjá henni varð hildin í Svínoy, og tey, sum upplivdu henda framúr góðveðursdagin og væl upplagda 100 ára gamla føðingardagsbarnið og allan blíðsskapin, sum familjan og bygdin sýndi, fara altíð at minnast aftur á hesa fagnaðarløtuna.

Malla giftist í 1931 við Edvardi Jacobsen. Tey vóru bæði ættað úr Svínoy. Hann uttan úr Váli, sonur Ingu og Simon Just Jacobsen, og hon úr Yvirstovu. Hon var yngst av teimum átta børnunum hjá Amaliu og Poul, sum var ættaður úr Nornastovu í Mikladali. Hann var smiður, tá ið kirkjan í Svínoy varð bygd í 1878, og tey bæði giftust í 1882.

Elst av systkjunum hjá Mallu var Annika, sum var fødd í 1883 ella 121 ár frammanundan, at yngsta systurin nú doyði.

Malla og Edvard fingu fýra synir: Bjarni, Helgi, Atli og Ingi. Bjarni býr í Havn, Helgi í Klaksvík, Atli á Eiði og Ingi í Havn.

Í heiminum hjá Mallu og Edvardi hava mong gist og notið blíðsskap. Tey vóru í mong ár álitisfólk í lítlu samkomuni Smyrna, og nógv, sum hava vitjað í Svínoy í sambandi við møtir í salinum, plagdu at vera hjá Mallu og Edvardi. Edvard, sum var føddur 25. juni í 1903 og doyði 29. januar í 1985, var tiltikin góður predikantur.

Kistan við Mallu fer til Svínoyar í morgin, og hon verður jarðað týsdagin.

## Pidda 85 ár



Í morgin, sunnudagin hin 19. septembur fyllir Peter Larsen í Porkeri, vanliga nevndur Pidda, 85 ár. Føðingardagur hansara hevur hesi sermerktu tølini: 19.09.19.

Pidda er sonur Peter Emil Larsen, bónda í Gjørðum og Jensinu, fødd Egholm, ið var ættað úr Streymnesi.

Pidda er elstur av systkjunum. Hini systkini eru Betty, vanliga nevnd Diddan og býr hon í Klaksvík. Erling, ið fór út at sigla búsettist niðri. Yngstur av systkjunum er Gudmund, sum búsettist í Vági.

Pidda vaks upp í eini tíð, sum var sermerkt av nógvum og strævnum arbeiði. Gjørðagarður, sum hann var borin til, er góðar 6 merkur og var nóg mikið hjá honum at takast við har longu frá heilt ungum av. — Pápin hansara hevði eisini telefonarbeiði og ansaði vitanum í Nesinum. Eisini róði hann út. Pidda kom at taka garðin eftir pápa sín og tók hann eisini alt hitt virksemið upp eftir hann.

Hjá Telefonverki Føroya Løgtings starvaðist Pidda í uml. 60 ár. Tað munnu vera fá av teimum tilkomnu og eldru, sum ikki kenna hendan mannin, sum arbeiddi sum linjumaður og við at leggja telefon inn í so mong hús í sunnaru helvt av Suðuroynni.

Pidda hevur verið úti fyri ymiskum merkisverdum hendingum sum ungur.

Í 1927 hendi ein vanlukku sum mundi kravt mannalív í Porkeri. Ein bátur var komin úr Vági eftir fiskagentum og legði at eini træbrúgv í mølini. Súður var í sjónum. Báturin var bundin í brúnna, har fiskagenturnar stóðu. Pidda, sum bert var átta ára gamal var komin oman við mjólk, sum skuldi við bátinum til Vágs. Bráddliga var brúgvin rivin leys og rak frá landi. Øll, ið vóru á brúnni fóru á sjógv uttan Pidda, og var tað um reppið, at fleiri teirra druknaðu. Pidda var heppin og var sitandi á flótandi brúnni.

Undir Seinna Heimsbardaga rak eitt norskt skip, Vardefjell, eystan fyri Suðuroynna. Tað var brotnað av um miðjuna. Forskipið var sokkið og sjólótust 12 menn, ið vóru staddir har frammi. Afturpartur skipsins fleyt og rak nú fyri vág og vind. Pidda var henda dagin komin umborð á postbátin, sum skuldi til Vágs, men á veg inn fingu teir boð um at fara út til vrakið. 27 menn vóru bjargaðir av vrakinum.

Pidda róði út saman við øðrum porkeningum undir krígnum við Dalfossi. Ein dagin, teir vóru Uttan Stein komu teir fastir í eina minu. Teir ið vóru við vóru Alexander Djurhuus og sonur hansara Niels, Christian Djurhuus, Johan Larsen, Manne Larsen og Pidda. Komnir á fiskileið komu Johan og Christian fastir í eitthvørt, sum teir hildu verða eina flundru. Bráddliga varð ein hvøllur brestur sum lyfti bátin leysan úr sjónum. Allir mistu teir vitið. Christian, ið stóð frammi í skut var slongdur aftur í toftirúmið. Motorhúsið loysnaði og datt fram av. Alt var ein ruðuleiki umborð. Men til alla lukku sprongdist minan so niðarlaga í sjónum, og var hetta teirra bjarging.

Í 1947 giftist Pidda við Lydiu Vestergaard úr Vági. Lydia er dóttur Kristin á Økrum og Onnu Soffíu, fødd Knudsen av Glyvrum. Tey giftust inn í Gjørðar í Porkeri og fingu 5 børn. Tey eru Per, sum býr í Syðrugøtu, Ansa Dam, sum býr í Klaksvík, Kaj, sum býr í Porkeri, John, sum býr í Vági og Heri, sum býr í Porkeri.

Pidda hevur havt sína vanligu gongd í Betania í Porkeri, sum er salurin hjá brøðrasamkomuni. Hann hevur tikið lut í sunnudagsskúlaarbeiði og annars eisini tikið trúliga lut í at tala orð Guds. Hann ferðaðist eisini nógv til útimøtir í bygdunum her fyrr og seinnu árini hevur hann borið kristiligan lesnað inn í nógv heim í Føroyum. Eisini hevur hann verið uttanlanda, í Danmark, Noregi og Rumenia við kristiligum lesnaði.

Pidda hevur altíð verið ein sera fryntligur og hugnaligur maður at hitt. Hóast sín høga aldur má sigast, at hann ber seg ómetaliga væl. Hann er framvegis virkin og er javnan at síggja bæði í bø og haga.

## Pauli Vang 65 ár



Í dag, leygardagin 18. september, verður Pauli Vang, Glyvrar, 65.

Pauli er føddur í Kaldbak í 1939, sonur Einar og Vilborg (fødd Nolsøe). Hann vaks upp í Kaldbak saman við yngru beiggjunum Árna, Pola (Napoleon) og August.

Í 1967 giftist hann við Almu (fødd Hansen). Tey búðu í Havn inntil 1970, tá tey fluttu inn á Glyvrar, har tey búgva enn. Alma og Pauli eiga synirnar Einar, Dánial, Búgva og Trygva. Ommu- og abbabørnini eru seks í tali.

Pauli fór til skips sum 15 ára gamal við línubátinum Vón. Hann er nú við Krúnborg og hevur sostatt arbeitt á sjónum í 50 ár.

Fyri tað mesta hevur hann verið við Boðanesi, Polaris og Krúnborg. Millum onnur skip, hann hevur verið við, kunnu nevnast Gullfinnur, Skúgvur, Havørnin, Brestir og Mjóanes. Eitt tíðarskeið var hann við troli í Suðurafrika og við nót í Senegal.

Pauli er ein álítandi maður við fáum orðum, røkin og hevur gott tol.

Føðingardagin er Pauli burturstaddur.

Hjartaliga tillukku við degnum og nógv góð ár framyvir.

## Andlát

8. september
Óli Midjord, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn, 75 ár.

9. september
Karen Egholm, búsitandi í Høll í Suðurjútlandi, 97 ár.

10. september
Niclas Niclasen, Sørvági, 62 ár.

12. september
Rósing Anthoniussen, Klaksvík, 57 ár.

14. september
Nicolina Olsen Gaard, vanliga nevnd Lina, Fuglafirði, 79 ár.

15. september
Malla Jacobsen, Svínoy, 102 ár.

## Vaskikonur á útferð

Seinasta sunnudag fóru eitt stórt ferðalag við vaskikonum úr Klaksvík á stuttleikaferð í Vágarnar. Talan var um vaskikonurnar í Christianskirkjuni. Ferðalagið var stórt, og umframt vaskikonurnar vóru báðir prestarnir, umboð fyri kirkjuráðið og ein deknur við.

Hetta var eitt gamalt hugskot, sum endiliga bleiv ført út í lívið, og fingu tey ein frálíkan túr.

Fyrst fóru tey til gudstænastu. Nøkur valdi at fara í kirkju í Sandavági, meðan onnur fóru í Miðvági.

Aftan á gudstænastuna fóru tey á hotellið at eta.



*Ferðalagið var stórt, og umframt vaskikonurnar vóru báðir prestarnir, umboð fyri kirkjuráðið og ein deknur við*

*Mynd: Jens K. Vang*

Síðani gekk leiðin við bussi til Gásadals, har tey gingu oman til sjálva bygdina.

Tá tey høvdu verið í Gásadali, varð farið heim aftur til Klaksvíkar.

Ferðalagið var stórt, um 100 fólk, og lótu tey øll væl at hesum stuttleikatúri, sum hóast regnið, var væleydnaður.

**- sae –**



Rokkur í Gøtu:

# …Men hvar var Bogi Berg?

**Lagnudagin 11/9 kl 21 var rokkkonsert í Gøtu**

UMMÆLI
*Karl Anton Klein*



Tað var sum ikki eina ferð tónleikasamtakið, Grót, sum stóð aftan fyri tiltakið við bólkunum 48 pages, Zink og Róp.

Hóast konsertin ikki var so nógv lýst frammanundan, var fitt av fólki komið í reyðu húsini, sum tíbetur standa eitt sinddur fyri seg sjálv, soleiðis at til ber at larma.

Og sigast kann beinanvegin, at ljóð-støðið var í tí harðara endanum av skalanum. Við hvørt kanska eitt sindur ov hart, tí hølini hóska seg nokk ikki til allar teir øru frekvensarnar úr Havn.

Konsertin byrjaði við 48 Pages, sum hava ment seg nógv, eftir at teir hava verið í Íslandi, har teir fingu sera góða móttøku og eisini góð ummæli.

Teir spældu teirra egnu løg og eisini okkurt coverlag av egnum løgum (hvussu tað so skal skiljast).

Men teir vóru góðir, vælupplagdir, sjálvt um tað tóktist, sum frástøðan til gløggu lurtarafjøldina í Gøtu kendist eitt sindur stór.

Hølini eru eitt sindur merkilig, tí tað er býtt upp soleiðis, at á gólvinum kann man liggja (tað sær út sum at tað ikki er cool at dansa ella flippa út á gólvinum í Føroyum). Har lógu so nøkur og slongdust, meðan restin, tey flestu, sótu uppi á ovara gólvinum og fylgdi við tónleikinum. Vóru kanska eitt sindur sein í tí, men komu tó við sum frá leið.

48 pages endaðu eitt gott sett við eini føroyskari útgávu av teirra absolut størsta hitti Me And My Boyfriend.

Eg veit ikki, men eg haldi, at enska útgávan er betri enn føroyska. Og líka mikið hvussu ofta tú roynir, so fært tú ikki bygdafólk til at syngja við upp á »Eg og mín sjaikur«.

Síðani komu Zink og settu streymin á heila lortið. Alt fekk eitt annað flog.

### Einastandandi

Frá tí eitt sindur tunga 48 pages til lættari men sanniliga ikki minni larmandi punkpoppin hjá Zink.

Eg velji at síggja manglandi dansin og flippariíð sum tað, at áhoyrara-fjøldin var so hugtikin av hesum, at tey gloymdu at flippa út. Kanska flippaðu tey inneftir ístaðin?

Zink spældu eitt so gott sett, at eg eri um reppið at halda teir vera suverent nr 1 á dagsins føroyska rokkpalli.

Serliga eru tað tey nýggjaru løgini sum bróta frá inspiratiónunum Blink og Green Day, sum fáa Zink upp á eitt støði, har teir hava verið ávegis í fleiri ár. Men sigast kann, at seinasta árið hevur verið so nógv tað besta hjá teimum. Og settið leygarkvøldið 9/11 í Gøtu var so nógv tað besta eg higartil havi hoyrt Zink. Eitt vælupplagt, vælspælandi og orkufullt sett. So hevði eg havt stjørnur at býta út, so høvdu teir fingið fult stigatal.

At enda kom Róp. Eg visti ikki ordiliga, hvørjum eg skuldi rokna við. Eg visti, at teir larma, og teir larma illa.

### Hart róp

Millum Zink og Róp var ein heldur langur steðgur, har fólk kundu strekkja beinini, fara út um og fáa sær fríska luft og hvíla oyruni.

Róp byrjaðu. Og tað var ræðuliga hart. Lágt stemmaðir guitarar, so teir vóru við at fara niður gjøgnum gólvið.

Fyrsta lagið var ótrúliga gott. Eitt øgiligt drive sum fekk sjálvt meg sum einasta mann á gólvinum at nikka. Tað var eitt sera orkumikið lag, sum tíverri eisini gjørdi ein enda á stórtrummunum, soleiðis at teir máttu renna land og ríkið runnt fyri at finna eina nýggja trummu. Tá hon var funin, var eg ávegis avstað. Kanska eitt sindur órímuligt men...

Eftir hesum eina lagnum at døma so vóni eg, at restin av konsertini var góð. Eg veit, at eg gleði meg til at hoyra teir aftur.

Sigast kann tó um henda ógvuliga tunga tónleikin, at viðhvørt so haldi eg hann vera eitt sindur foroldaðan, og eg ivist í, hvar øll øðin, sum skal til fyri at fáa lortið at svinga, blívur av.

Eitt nokso festligt innslag í konsertini var, at Spren Rex veitti eitt slag av tónlistarligari ulandshjálp við at forera fløguna Ampaljóð (tey flestu í Losjuni høvdu ikki ognað sær hana áður). Sigast kann um konsertina, at eitt manglaði. Vit hava javnan verið í Eysturoy og leita eftir Boga Berg, men hava ikki funnið hann enn. Soleiðis var eisini hetta kvøldið. Bogi Berg er horvin, og um nakar veit at siga frá, hvar hann kann vera, so sigi endiliga frá.



*Tað gekk ikki spakuliga fyri seg, tá Róp fór á pallin*

# Akraberg eystureftir seinni í ár

**Væntandi verður steðgurin hjá Akrabergi undir íslendskum flaggi ikki serliga langur, tí skipið eigur kvotu eftir eystanfyri, sum ætlanin er at fiska**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í hálvan annan mánaða ella so hevur trolarin, Akraberg, fiskað undir íslendskum flaggi, men væntandi er ikki, at tíðin undir øðrum flaggi verður serliga drúgv.

Á skrivstovuni hjá reiðarínum á Toftum, siga tey, at skipið, sum nú virkar flak undir Íslandi, væntandi fer eystureftir at royna, tá ið líður longur út á heystið.

– Skipið eigur føroyska kvotu eftir í Barentshavinum, og tá ið farið verður eystureftir, verður aftur siglt undir føroyskum flaggi, siga tey.

### Høgaberg til eftirlit

Nótaskipið, Høgaberg, sum felag á Toftum eisini eigur, hevur seinastu dagarnar staðið á Tórshavnar Skipasmiðju til eftirlit, men sum skilst, verður eftirlitið liðugt í dag sum ein annan dag.

Skiparar á Høgabergi eru Jógvan Hentze í Syðrugøtu og Hans Jacob Petersen í Norðdepli.

### Stapin við línufiski

Línuskipið, Stapin, landaði 67.000 pund á Toftum í gjár.

Tá ið vit frættu, høvdu tey á skrivstovuni ikki sæð avreiðingarseðilin, men slagið hjá línubátunum í summar hevur fyri tað mesta verið hýsa, longa og brosma.

Stapin var hendan túrin undir Føroyum.

Skipari á Stapanum er Brandur Højgaard, sum er ættaður úr Saltangará.



*Akraberg fiskar undir íslendskum flaggi í løtuni, men tað verður neyvan leingi aftrat*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*